# Tjaldur var vakrari skip

**Ein teirra, sum fyri hálvari øld síðan tók í móti nýggja Tjaldrinum, var eisini á bryggjuni, tá nýggja Norrøna kom. Hann heldur, at gamla skipið var vakrari enn tað nýggja**

FERÐAMANNASKIP
*Edvard Joensen*



*Petur Skeel Jacobsen var á bryggjuni og tók í móti nýggju Norrønu, sum hann eisini var fyri 50 árum síðan, tá nýggja Tjaldur kom. Hann hevur verið við trimum Tjøldrum og skjótt tvemum Norrønum umframt øðrum feðramannaskipum, sum hava siglt millum Føroyar og Danmark*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Tórshavn:**
Petur Skeel Jacobsen úr Havn var staddur á bryggjuni, tá nýggja ferðamannaskipið Tjaldur hjá Skipafelagnum Føroyar kom á Havnina 1. februar 1953. Hann tók eisini í móti Norrønu tann 10. apríl 2003.

– Eg má siga tað, at Tjaldur var vakrari skip. Sniðið er nógv broytt hesa hálvu øldina. Men eg ivist ikki í, at Norrøna er gott skip, sum eg ætli mær at royna, sigur hann og vónar, at hendan nýggja Norrøna hevur størri dansidúrk, enn gamla Norrøna hevði.

Petur Skeel Jacobsen hevur ferðast við nógvum ferðamannskipum millum Føroyar og Danmark. Hann var fyrstu ferð við gamla Tjaldrinum, tí sum fórst á Mjóvanesi, í 1939. Síðan hevur hann roynt øll Tjøldrini og eina Norrønu umframt okkurt DFDS skip. Til dømis ta legendarisku Drotningina. Og hann ætlar sær við nýggju Norrønu heilt skjótt.

– Og fyri at gera listan fullan, kann eg siga, at eg var í Hanstholm og dansaði fyri Smyrli, tá hann fyrstu ferð kom hagar í 1975, minnist Petur eisini.

Petur Skeel Jacobsen er nógv upptikin av veðrinum, tá hann tosar um ferðamannaskipini. Tjaldur var eitt illveðursskip, um so kann sigast. Tað kom í illveðri, minnist Petur, og tað hevði fleiri ringar túrar av veðri eisini. Tann ringasta túrin, Tjaldur gjørdi, var, so løgið tað ljóðar, mitt um summarið. Tað var mitt í juni 1959, og kavin lá oman í hálvan hagan, minnist veðurfrøðingurin.

# Ræðisavmarkingar eru einki verdar

**Tað at skip verður ræðisavmarkað, tá tað verður tikið út flotanum, hevur ongan praktiskan týdning. Tí tá ein keypari er til skipið, strikar Fiskimálastýrið bara ræðisavmarkingina og flytir hana yvir á okkurt annað far ístaðin, um biðið verður um tað**

FISKILOYVI
*Edvard Joensen*



*Úr Fiskimálstýrinum verður sagt, at ræðisavmarking av einum skipi til einahvørja tíð kann strikast, um okkurt annað far verur ræðisavmarkað ístaðin. Tað er humbukk og at halda fólk fyri spott, siga formenninir í Vinnunevndini og Felagnum Línuskip*

Tá línuskipið Ågot varð seld norðmonnum, tí klaksvíkingar fingu annað skip ístaðin, varð sett í loyvið frá Fiskimálastýrinum um flyting av fiskirættindunum dagf. 15 august 2001, at Ågot ongantíð aftur máti reka vinnuliga fiskiskap undir føroyskum flaggi. Kortini hevur skipið nú fingið loyvi til júst hetta.

Stjórin á Fiskivinnustovuni vísir til ein dóm, sum sigur, at ræðisavmarkingin uttan víðari kann flytast.

– Humbukk, sigur formaðurin í Vinnunevnd Løgtingsins, og formaðurin í Felagnum Línuskiop sigur tað vera at halda fólk fyri tað turra spott.

Tann 15. august 2001 hava Jørgen Niclasen, landsstýrismaður við fiskivinnumálum og ein embætismaður í Fiskimálastýrinum skrivað undir loyvi til at flyta fiskirættindini hjá Ågot til norska línuskipið Urvaag, sum keypt var at koma í flotan fyri Ågot, ið tikin varð úr flotanum og seld norðmonnunum, sum áttu Urvaag.

Í hesum loyvi frá Fiskimálastýrinum stendur tann treyt, at :

»Tilsøgnin um flyting av fiskirættindunum er eisini treytað av, at eigarin av m/s "Ågot" við ræðisavmarking váttar, at skipið ikki verður sett inn í vinnuligan fiskiskap aftur undir føroyskum flaggi. Somuleiðis skal vera tilskilað, at skipið ikki má seljast uttan so, at keyparin góðtekur hesa avmarking í nýtsluni av skipinum«.

Hesa ræðisavmarking hava so bæði seljarin og keyparin váttað á einum ískoytisskjali, sum liggur við loyvinum um flyting av fiskirættindunum hjá Ågot.

Kortini hendir so hvørki verri ella betri enn tað, at Ågot, sum nú eitur Ågot 1, verður keypt av føroyskum felag og fær fiskiloyvi undir føroyskum flaggi frá sama Fiskimálastýri, sum tó nú eitur Fiskimálaráðið. Hóast hesa áðurnevndu ræðisavmarking.

– Tað er einki, sum hindrar tí, sigur stjórin á Fiskivinnustovuni í Fiskimálaráðnum. Tað er beinleiðsi álagt okkum í dómi, sigur hann.

Talan er um borgarligan dóm nr. 817/1999, har sagt verður, at ræðisavmarkingin kann strikast, um annað ella onnur før samstundis verða ræðisavmarkað.

Formaðurin í Vinnunevnd løgtingsins, Henrik Old, og formaðurin í Felagnum Línuskip, Rólant Poulsen, eru milt sagt ikki nøgdir við hesa tulkingina.

Henrik Old, formaður í Vinnunevndini, heldur tað vera tað reina humbukk alt tað heila.

Hann undrast á, hvat hatta skal standa í lógum og kunngeðrum til, tá tað einki virði hevur kortini. Og so seint sum seinasta fríggjadag er kunngerð lýst við júst hesum sama orðalagi um ræðisavmarkingar. Tað er ov vánaligt av Fiskimálastýrinum, heldur hann, at tey har vita um hendan dómin og kortini blíva við at seta slíkt í kunngerðirnar.

Formaðurin í Felagnum Línuskip sigur tað vera at halda fólk fyri tað turra spott at kunngerða slíkt, tá ein veit frammanundan, at tað kann broytast sum best ber til kortini.

– Her skriva mennundir eitt skjal í góðari trúgv og gera, sum lógin ásetir. Teir lata eitt stórt skip frá sær, tí soleiðis er álagt teimum. Men sama skip fáa aðrir so aftur fyri tveir smáar útróðrarbátar. Hesir fyrru menninnir kundu gott gjørt akkurát tað sama. Nú eru teir rukkur ístaðin, heldur hann.



# Hjarta brennir fyri umhvørvinum

**Hóast Erling Simonsen líður av parkinsonsjúkuni, hevur hann átikið sær uppgávuna sum formaður í FNU, Føroya Náttúruverndarfelag - Eg helt ikki, eg kundi bera meg undan, men eg havi sett nakrar treytir við formansstarvinum, sigur hann**

UMHVØRVI
*Vilmund Jacobsen*



*Erling Simonsen er nú formaður í FNU, Føroya Náttúruverndarfelag. - Eg helt ikki, eg kundi bera meg undan, tá ið heitt varð á meg, sigur hann.*

Á aðalfundi hjá Føroya Náttúruverndarfelag, sum varð hildin á Hotel Hafnia, 12. apríl, varð nýggj nevnd vald.

Nevndin skipaði seg við Erlingi Simonsen sum formanni. Hinir nevndarlimirnir eru Eyðun Lauritsen, Saltangará, Brynjálvur Nattestad, Miðvágur, Jóhan Christiansen og Hans Ellefsen, Tórshavn. Nýggir tiltakslimir eru Kári Thomsen og Oddmar J. Samuelsen, Tórshavn.

## Sett treytir

Nýggi formaðurin í felagnum, Erling Simonsen, sigur, at hann hevur játtað at gerast formaður í FNU, hóast heilsan ikki er so góð. Erling líður nevniliga av herviligu parkinsonsjúkuni.

- Eg havi sett nakrar treytir við formansstarvinum, har eg eitt nú kann útdelegera ymiskar uppgávur og fáa hjálp til aðrar. Við míni heilsustøðu, tori eg ikki einsamallur at átaka mær at halda skil á øllum og fylgja neyvt við øllum tí, sum felagið luttekur í.

Spurdur, um hann í fyrsta lagi verður ein – í positivum týdningi – kransakøkufigurur hjá felagnum, sigur Erling, at nakað soleiðis hongur tað saman.

- Virkar skipanin ikki, sum eg vil, at hon skal gera, er møguleikin at taka meg aftur sum formaður, sigur hann.

Eingin skal tó ivast í, at hjartað hjá Erlingi brennur fyri umhvørvinum og øllum tí, sum uppi í hesum hongur.

- Eg haldi, at FNU er tað mest týðandi felagið, vit hava. Tað, sum felagið stendur fyri, snýr seg um lívið hjá okkum øllum – og í allar mátar. Ganga vit væl um náttúruna og alt, sum í henni rørirst og nørist, kemur tað at gagna okkum sjálvum.

Erling vísir á, at náttúruvernd fevnir bæði um sosial viðurskifti, fíggjarviðurskifti, veðurlagsbroytingar og ikki minst um politisk viðurskifti.

Nýggi formaðurin heldur ikki nógv um, at heimssamfelagið byggir sína orkukeldu á olju og kjarnorku, og hann heldur, at hetta fer at koma okkum aftur um brekkur.

- Vit vita ikki, hvussu leingi oljan, sum er lívrunnin, verður ein orkukelda. Um hetta verður í 10 ella 50 ár, er undirornað, tí einaferð kemur tann dagur, tá ið henda orkukelda er uppi. Tá ræður um at vera fyrireikaður, og lítið er, sum bendir á, at heimssamfelagið tekur nóg stór stig tann vegin, heldur Erling.

Hann leggur dent á, at vit noyðast at laga okkum til tey krøv, sum náttúran og lívið seta.

- Vit mugu hava so mikið at skili, at lívið kann livast – ikki bara í nærmastu framtíð, men altíð.

## Vardi meg ikki

Erling sigur, at tað vardi hann ikki, at hann fór at vera biðin til undangongumann í FNU, tí hann er ikki so gamal í garði í felagnum.

Spurdur, um tað hevur havt sín týdning, at hann hevur bygt bil sín um, soleiðis at hann nú koyrir við matolju heldur enn diesel-olju, heldur hann, at tað hevur havt sín týdning.

- Eg vil siga, at nógv hava givið sær far um hetta, bæði her heima og uttanlands.

Erling sigur, at bilurin koyrir væl, og tá ið motorurin er nóg heitur, er kraftin í minsta lagi tann sama, sum frammanundan.

- Eg helt, eg illa kundi bera meg undan, nú heitt varð á meg um at gerast formaður í FNU, Føroya Náttúruverdarfelag, sigur 71 ára gamli og fyrrverandi tannlæknin.

# Bátafelagið á Bakka nýggjan formann

**Seinni í summar fer felagið aftur at skipa fyri Bakka-hugna og fiskikapping**

TILTØK
*Vilmund Jacobsen*



*Bátafelagið á Bakka, sum hevur sløk tvey ár á baki, hevur stívliga 60 limir. Felagið byggir felagshús innanfyri kappróðrarneystið á Bakka. Á aðalfundi felagsins, 27. apríl, skal nýggjur formaður veljast*

Sunnudagin, 27. apríl kl. 17, hevur Bátafelagið á Bakka aðalfund.

Charles Jacobsen, formaður í felagnum, sigur, at miðjað verður eftir at halda fundin í húsunum, sum felagið letur byggja innanfyri kappróðrarneystið á Bakka.

- Húsið er ikki liðugt enn, og tað verður heldur ikki liðugt til aðalfundin. Vit miðja tó eftir, at húsini standa innilokað til aðalfundin.

Ætlandi vórðu sperrurnar lidnar seinasta vikuskiftið. Síðan er eftir at fáa útveggirnar upp at standa, og takið lagt á, soleiðis at aðalfundurin kann haldast í hølunum.

- Vit vænta ikki, at vindeyguni eru komin í til aðalfundin, sigur Charles.

Hann leggur aftrat, at verða hølini ikki innilokað, 27. apríl, tá ið aðalfundurin er lýstur at verða, verður fundurin í staðin hildin í kappróðrarneystinum.

Húsið, sum Bátafelagið á Bakka letur byggja, verður umleið 50 fermetrar.

## Nýggjur formaður

Tað var Charles, sum tók stig til at stovna Bátafelagið, og hann hevur sitið sum formaður í felagnum hesi tvey árini, felagið hevur verið virkið.

- Skipanin sigur, at formaðurin kann bara sita í tvey ár í senn; tí skal nýggjur formaður veljast á komandi aðalfundi.

Hann heldur, at skipanin við, at formaðurin skal skifta, tá ið tvey ár eru umliðin, er góð.

- Tað er í fínasta lagi, at tú verður avloystur sum formaður, tá ið tú hevur sitið í tvey ár, heldur hann.

Formaðurin kann tó halda fram í nevndini sum nevndarlimur. Í nevndini sita annars 5 limir.

Bátafelagið á Bakka hevur stívliga 60 limir, men Charles Jacobsen dugir ikki í løtuni at siga, hvør avloysarin verður.

## Bakka-hugni og fiskikapping

Í fjør skipaði Bátafelagið fyri sonevndum Bakkahugna, og ætlanin er at taka hetta tiltak uppaftur í ár. Nær dagurin verður, er ikki endaliga avgjørt enn, men hetta verður ein leygardag síðst í juli.

Hendan dagin fer Bátafelagið á Bakka eisini at skipa fyri fiskikapping.